


# Dollin kom at liggja nærum lið um lið við vermammuna

**Tað áhugaverda við hesi greinarøð úr gamla kirkjugarðinum er, at lýsing av eini grøv førir til lýsingina av eini aðrari. Tað er hetta, sum talan er um í samband við Daniel J. Danielsen, hvørs grøv er væl kend. Men hetta hevur nú ført til, at vit hesa ferð kunnu vísa og lýsa grøvina hjá verforeldrum hansara. Katrinu, vermannan, liggur í grøvini, men navnið á verpápanum er eisini á steininum**



ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo

Sum vit hava greitt frá fyrr, var Dollin giftur við Linu, sum var dóttir Katrinu f. Viderø av Viðareiði og Jógvan Niclassen av Skálatoftum. Tey vóru búsett í Leith.

Jógvan var føddur 2. januar 1846. Hann var sonur Niclas Joensen og Súsonni Pedersdatter, sum var ættað norðan úr Vági.

Í Tey bygdu Land verður greitt frá, at Jógvan sum ungur slapp við skotskum línubáti, sum hann plagdi at fiska goggur fyri í Haraldssundi. Úrslitið er so, at hann og konan búsetast í Leith í Skotlandi. Tey fingu tvær døtur.

Lina kom at arva eini hús á Viðareiði frá mammu síni, og hesi gjørdust fyrsti fundarsalur hjá Brøðrasamkomuni í bygdini.

Cathrina Henrikka, sum var hennara fulla navn, átti eina systir, Elspa. Hon giftist við einum havnarmanni, Sakarias Poulsen. Hann var sonur Polla Vilhelm. Tey búðu eisini í Leith og áttu børn. Tað kundi verið áhugavert, um nakar veit meira um tey.

Foreldrini hjá teimum báðum systrunum vóru Elsebeth Simonsdatter og Simon Danielsen úr Miðstovuni á Viðareiði. Tey mugu hava kallað seg Viderø seinni, tí Cathrina er fødd Viderø.



*KATRINE NICOLSON F. VIDERØ*
*JOEN F. NICOLSON BOSAT I LEITH*
*FØDT 3. FEBRUAR 1840 HENSOVET 30. AUGUST 1907*
*BORTE FRA LEGEMET HJEMME HOS HERREN*



*Her eru tríggir gravir í eini røð. Katrina, Inger og Daniel. Mittasta grøvin var ætlað Linu, men hon fekk ikki brúk fyri henni.*

## Jógvan í Leith

Tað hevur verið roynt at fáa meira at vita um tey, men illa hevur gingist. Rendi meg kortini heilt av tilvild av eini umrøðu av Jógvan Niclassen, sum hevur staðið í Føroya Siglingarsøgu hjá Páll J. Nolsøe.

Søgan snýr seg um skipið May Flower, sum Dánjal Pauli Thomassen í Búðini í Sørvági keypti í Leith í 1892. Kostnaðurin var kr. 4.000. Søkt varð um lán úr statskassanum til keypið, men tá ið teir koma til Leith fáa teir at vita, at einki lán verður latið.

Í Leith kemur Dánjal Pauli í samband við Joen Niclasen ella John Nicolson, sum hann eisini skrivar seg. Hann lænir Dánjal Paula 150 pund, og Dánjal Pauli setir í veð eitt pakkhús og nakrar gyllin í jørð.



*Jógvan Niclassen, maður Katrinu, hvørs navn eisini er á gravsteininum.*

Skálatofta Jógvan starvaðist sum stevedor ella formaður fyri havnaarbeiðsmonnunum, tá ið Dánjal Pauli hitti hann í Leith. Teir hava óivað kenst úr Føroyum.

Jógvan doyði 21. september 1895. Einkjan kom heim aftur til Føroya og gevur 11. september 1906 kvittan fyri, at lánið hjá Dánjal Paula er afturgoldið. Tað kann kanska hugsast, at tað hevur verið við til at figgja virksemið hjá Dollanum.

Katrina doyr 30.august 1907 og er grivin í gamla kirkjugarði. Tískil komu tey bæði, Dollin og vermóðurin at liggja í sama kirkjugarði nærum lið um lið.

Frá lokalsøguliga arkivinum í Leih hava vit annars fingið upplýst, at Lina og Dollin giftust 20. mai 1904 í Glasgow.

Lina varð umvend tann 7. november 1903. Hetta er beint eftir, at Dollin er komin heim úr Congo og Dollin hevur talað í samkomuhúsinum, Carrubbers Close í Edinburgh, har Lina kom á møti júst hendan dagin. Tað er sannlíkt, at tað er her tey hava hitt hvønn annan.

Frá umrødda arkivi hava vit eisini fingið at vita, hvat ið hendi Linu. Hon er als ikki nevnd í føroysku keldunum, eftir at Dollin doyði í 1916.

Men frá postkortum, sum Poulina Djurhuus, ættað av Hvítanesi, hevði fingið hjá vinkonuni Linu, kundi síggjast, at hon í 1920 var stødd í Leith og hevði tá ætlan um at fara til Føroyar aftur.

Men nú hava vit so fingið staðfest, at hon doyr 24. juli 1937 í Leith, 58 ára gomul. Í kirkjubókini sæst annars, at hennara fulla navn er Nicoline Henriette. Hetta er so blivið Lina í Føroyum og Lena í Bretlandi, sum gevur somu úttalu sum í Føroyum.



*Polla Vilhelm, verfaðir Elspu, systir Katrinu.*

Lina er gift aftur. Seinni maðurin eitur John Smith, og hevur verið slaktari. Hon er deyð av hjartaslag heima, og maðurin hevur verið hjá henni.

Vit hava roynt at fáa at vita hvat ið hendi hini systrini, men tað er ikki eydnast enn. Men tað, at mamman er flutt við Linu til Føroyar kann benda á, at eingin dóttir hevur verið eftir í Leith at vera hjá.

## Inger fekk óbrúktu grøvina

Á kirkjugarðinum liggja í eini røð Katrina, Inger M. Jacobsen, mamma Kristinu, sum var gift við Jens Paula á Reyni og síðan Daniel J. Danielsen. Inger er grivin her í 1944, níggju ár eftir at nýggi kirkjugarður annars var tikin í nýtslu.

Tað kann væl hugsast, at ætlanin hevur verið, at Lina sjálv skuldi liggja í mittastu grøvini. Men tá ið hon flutti av landinum og búsettist í Leith, gjørdist hetta óaktuelt, og henda grøv gjørdist tøk. Her kom Inger so at liggja. Tað var ikki brúk fyri fleiri gravum til hennara, tí maðurin hennara Jens Pauli var deyður á sjónum. Vit koma seinni at hava eina frásøgn um Inger.

Tað ber ikki til at vita, hví Inger fekk hesa grøvina. Men har hevur verið neyvt samband. Vit vita í hvussu er, at tá ið Dollin kom heim til Føroya deyðasjúkur í oktober 1916, var tað sonur Inger, Aksel Jensen, sum var um hann á teirri drúgvu illveðursferðini heim.

**Næstu ferð**

Í komandi parti koma vit at umrøða Mariu og Ludvig Poulsen, sum eru kend handilsnøvn í Havn.